Tvøroyri er væl fyrireikað til oljuvinnuna

Henrik Thomsen (sum mong kenna frá fótboltsvøllinum) er formaður í Tvøroyrar Oljuvinnuráði, sum um stutta tíð fer at leggja fram eina týðandi ætlan fram um Tvøroyri sum eina komandi útgerðarhavn innan oljuvinnuna

Mynd: Kalmar

Seinni í hesum mánaðinum fer Tvøroyrar Oljuvinnuráð at leggja fram ætlanir sínar fyri eini komandi oljuhavn á Drelnesi. Fólk fylgja í spenningi við arbeiðinum hjá hesum týðningarmikla ráði, hvørs formaður er Henrik Thomsen

SNORRI BREND

– Skal føroyska oljan bara fara rennandi framvið okkum í Suðuroynni, uttan at nakað sæst eftir her á Tvøroyri?

Hetta var ein av spurningunum sum varð reistur fyri eini tíð síðani, og svarið frá vinnulívinum var eitt avgjørt nei:

– Vit vilja eisini hava lut í eini møguligari oljuvinnu á føroyskum øki.

Stig vórðu síðani tikin til stovnan av Tvøroyrar Oljuvinnuráði (stytt: TOR) við tí endamali at fyrireika vinnulívið til eina útgerðarhavn á Drelnesi.

Øll vinnurekandi á Tvøroyri fingu síðani høvi at gerast limir í hesum ráði, sum berfyri skipaði seg við Henrik Thomsen sum formanni. Í nevndini sóta eisini Finnbogi Danielsen og Thorman Vang.

Arbeitt hevur verið miðvist alla tíðina at rokka endamalinum. Og sum skilst á formanninum, fer ráðið í hesum mánaðinum at leggja fram eina rættliga avgerðandi ætlan um arbeiðið framefter – kanska longu í hesi vikuni.

50 fyritøkur stuðla oljuráðnum

Ta Tvøroyrar Oljuvinnuráð sa dagsins ljós, varð beinanvegin lagdur ein arbeiðssetningur út í kortið.

Í fyrsta lagi varð miðað eftir at útvega skriviligt tilfar, sum skuldi lýsa vinnulívið, fyritøkur og annað virksemi á Tvøroyri.

Hetta varð gjørt við einum snotuligum og ahugaverdum bókingi við heitinum «Tvøroyri – muligheder»; sum varð latin úr hendum í fjør.

Hesin bókingur, við umanfyri fimmti síðum, fer so at verða grundarlag í arbeiðinum at vísa ahugaðum utlendingum á teir møguleikar, sum bjóðast kunnu eini komandi oljuvinnu.

Her finst nevniliga eitt yvirlit yvir einar 50 vmiskar fyritøkur í Tvøroyrar kommunu, sum her hava høvi at greiða fra virksemi sínum.

Men oljuvinnuráðið hevði haraftrat sett sær aðrar uppgávur fyri, m.a. at útvega ráðgeving og aðra hjálp til allar hesar fyritøkurnar, eins og at skipa fyri vitjanum á Tvøroyri.

Hóast TOR bert hevur arbeitt í eini tvey ár, so er longu líkt til at fólk uttanfyri landsdeldar okkara hava gevið Tvøroyri og hesum arbeiði gætur.

Lúka treytir fyri eini oljuhavn

Henrik Thomsen sigur, at umboð fyri fyritøkur og virki úr Danmark longu hava verið og hugt eftir møguleikunum á staðnum. Og onnur eru avegis.

Hinvegin so hava umboð fyri vinnulívið og kommununa á Tvøroyri eisini verið á fleiri vitjanum í øðrum londum. Alt hetta hevur til endamáls at vísa á møguleikarnar á staðnum fyri eini supply-stað í landi.

Á Tvøroyri hava teir undar hesum vitjanum merkt til ahugan hjá utlendingum at vitja í Føroyum, men fyrst og fremst at hyggja nærri eftir umstøðunum har suðuri.

Fólk bíða í spenningi

Men tað eru ikki bert utlendingar, sum vísa hesum arbeiðinum hjá oljuvinnuráðnum ahuga.

Bygdarfolkið fylgir eisini spent við í øllum tí sum hendir á hesum øki, tí tey sjálvandi hava ahuga í at enn meiri vinnuligt virksemi verður í kommununi.

Á Tvøroyri hevur ein altíð havt stort tilknýti til fiskivinnu á sjógvi og landi. Men ahugi tykist vera fyri aðrari vinnugrein, so at ein ikki bert hevur fiskivinnuna at lyta á.

Tí munnu mong við spenningi bíða eftir teim ætlanum, sum oljuvinnuráðið fer at leggja fram í næstum.

Kommunan skapar karmar fyri vinnulívinum

SNORRI BREND

Tað er greitt, at skal ein slík kommuna sum tann á Tvøroyri fara undir eitthvørt virksemi í sambandi við oljuvinnuna, so er nevnugt at hava góðan stuðul frá kommunalu myndugleikunum.

Og ikki kann sigast annað, enn at Tvøroyrar kommuna so avgjørt hevur vist arbeiðinum hjá oljuvinnuráðnum ahuga og stuðul.

Í aðurnevnda bókling sigur borgarstjórin, Páll Vang, at kommunan altíð hevur ríkið ein virknan politikk innan vinnulívið.

– Byráðið er sjálvandi sinnað at stuðla ymsum prosjektum.

Vit vilja eisini vera við til at skapa karmarnar, meðan vinnulívið fyllir hesar út við nýggjum ætlanum og fleiri arbeiðsplassum, sigur Páll Vang.

Hann vísir m.a. á, at við teimum fyrirliggandi ætlanunum um eina komandi oljuvinnu, so liggur Suðuroyggin næst teimum bretsku oljuøkjunum, og tískil mátt í ella nærmast við eina føroyska oljuvinnu.

Tveir jassar spæla sjónleik á Tvøroyri

Gongst sum ætlað, sleppa fólk á Tvøroyri til sjónleik um Karius og Baktus í heyst. Lokala sjónleikarfelagið húsast annars undir sera góðum umstøðum

SNORRI BREND

Tað er ikki á hvørjum ári, at fólk á Tvøroyri sleppa til sjónleik við lokalum leikarum.

Men nu ætlar sjónleikarfelagið á staðnum at gera nakað við hetta. Og gongst sum ætlað, so verður í heyst farið undir at venja ein leik um teir báðar Karius og Baktus.

Ikki tí, – sjónleikarar úr felagnum á Tvøroyri hava longu verið á palli við hesum báðum kendu jassunum, nevniliga ta stóra sølustevnan varð fyriskipað í Trongisvagi beint fyri páskir.

Ta var bert framført eitt lítið brot úr hesum leiki. Men leikararnir biða nu eftir tí veruliga handritinum til leikin, soleiðis at tvørafólk og suðuroyingar seinni í ár fáa høvi at sigga allan leikin sum hann er.

Nevnast kann, at Tvøroyrar Sjónleikarfelag á vári í 1992 framførdi leikin «Mitt vár í heyst» við ialt seks leikarum. Hesin leikurin var framførdur á Tvøroyri og eitt nu í Havn.

Barnaleikur

Ta sølustevnur verða fyriskipaðar kring landið, verður altíð gjørt ymist til undirhalds fyri tey vitandi. Og í Trongisvagi høvdu tey ein styttri barnaleik, sum ein part av skranni.

Leikararnir úr sjónleikarfelagnum avgjørdu her at framføra eitt brot um Karius og Baktus, sum leikararnir sjálvir høvdu lagt til rættis út fra søgunni í bókini.

Leikararnir voru ikki nógvir í tali. Í veruleikanum var bert talan um ein leikara til hvønn jassin, og síðani ein viðleikara, sum aftanfyri leiktjaldini stóð fyri teimum ymisku ljóðunum og effektunum, sum hoyra til just hendu leikin.

Hesin leikurin vendi sær í størstan mun til børnini, og sum skilst hugnaðu tey sær ofurt saman við leikarunum og øðrum á sølustevnuni.

Men í august er so ætlanin at taka eitt stig viðari við hesum sjónleiki, og tá fara undir veruligar venjingar til almenna framførslu.

So her hava sjónleikahugaðir suðuroyingar – og kanska serliga tað yngra ættarlíðið – nakað at sigga fram til.

Sera góðar umstøður

Lidin eru mong ár síðani fólk á Tvøroyri tóku stig til at stovna eitt sjónleikarfelag. Hesi arini hevur felagið verið meiri og minni virkið.

Sjónleikarafelagið á Tvøroyri hevur við millumbilum vant sjónleik, sum tey so hava framført bæði í Suðuroynni og norðanfyri. Somuleiðis hevur tað verið virkið á øðrum økjum, m.a. við framførslum av «komediu'um» í Klubbanum.

Hetta er eisini staðið, sum er karmur um framførslurnar av sjónleiki hjá lokala felagnum, har bestu umstøður eru til slíkt. Annars fara venjingarnar vanliga fram í skulunum í Trongisvagi.

Á vári 1992 framførdi Tvøroyrar Sjónleikarfelag leikin «Mitt vár í heyst» við ialt seks leikarum. Nú er ætlanin at fara á pall við barnaleiki í heyst, har bert tveir leikarar vera við

Vágbingar sluppu ikki til sjónleik á hesum sinni

Sjónleikarfelagið í Vági hevði lagt eitt stórt arbeiði í venjingina av einum leiki, sum skuldi framførast á fyrsta sinni leygarkvøldið í farnu viku. Men nú er alt arbeiðið lagt á hyllina

SNORRI BREND

Eisini í Vagi finst eitt felag fyri tey sjónleikarhugaðu.

Í vetur høvdu tey sett sær fyri at framføra ein leik, sum á fyrsta sinni skuldi framførast leygarkvøldið í farnu viku. Men so langt komu tey ikki.

Ymisk viðurskifti gørdu at venjingarnar, sum høvdu verið í «Framtíðini» í Vagi ikki kundu halda fram, m.a. tí leikararnir í orðsins sanna týdningi vórðu frystir uti.

Stórt arbeiðið farið fyri skeyti

Tórgerð Suðuroy, sum eisini er virkin innan sjónleikin í Vagi, harmast fyri Dimmalætting um hetta.

Bæði leikararnir og leikstjórin høvdu í longri tíð lagt eitt sera stort arbeiði, nógva tíð og haraftrat nogvan pening í ætlaða leikin. Úrslitið av øllum hesum verður so ikki lagt fram fyri almenningin enn á sinni.

Sum skilst royndu leikararnir eisini at finna sær onnur høli til framførslurnar, soleiðis at arbeiði teirra ikki skuldi vera til fánytis.

Men tá hetta ikki eydnaðist, varð fyrr í mánaðinum tikin avgerð um at leggja alt tað, sum eitur sjónleikur, á hyllina á hesum sinni.

20 søkt stjórastarv

RANDI JACOBSEN

Styri fyri Tekniska Skulan í Havn hevur fingið 20 umsoknir inn til starvið sum stjóri á skulanum.

Umsoknarfreistin var úti mánaðagin.

Ætlanin er, at nýggi stjórin skal byrja 1. mai.

Styrið fer seinni í vikuni at taka støðu til, hvør best skikkaður er til starvið.

Til fyri 14 mánaðum síðan var Svenning Nielsen stjóri á Tekniska Skulanum í Havn. Tá var nógv stríð á skulanum, og tað endaði við, at stjórin varð sagdur úr starvi.

Síðan hann fór frá hevur Egon Øregaard verið fyribilsstjóri á skulanum.

Fyrireika mjørkakanningina

RANDI JACOBSEN

11. mai fær Tórshavnar byráð vitjan av tveimum dønum, sum koma upp at fyrireika kanningingarnar,ið gerast skulu av veðurlikindunum á Glyvursnesi.

Teir koma upp at hyggja at økinum, áðrenn byráðið fer at bilagja útgerðina til kanningarnar og seta hana upp.

Annar maðurin er ein flogvallarserfrøðingur, sum starvast í byggifyritøkuni Rambøl. Hesin maðurin hevur 14 ára starvsroyndir fra flogvøllinum í Kastrup.

Byráðið hevur játtað 530.000 kronur til hesar kanningar.

Fuglfirðingar »í útlegd«

kunnu gerast limir í felagnum «Karvatoftir», sum hevur stovnað grunn við sama navni við tí endamáli at varðveita «Kyrjastein», geva skipinum uppruna rigning og útjaðnd, seta tað við land á hoskandi øki í Fuglafirði í samráð við býráðið, so skipið saman við øðrum batum og evt. ogn á landi skal virka sum sjóasvn undir heitinum Fuglafjarðar Sjovinnusavn.

Adressan hjá felagnum er *Karvatoftir, c/o Óla Hendrik av Fletum, Landavegur 96, 100 Tórshavn, tlf. 312522.*

Vinnan ynskir størri skattajavning

Stendur tað til Føroya Arbeiðsgevarafelag, skal møguleiki vera fyri at afturføra hall og harvið fáa skattin frá góðum árum endurrindaðan í ringum árum

ELI GUTTESEN

Føroyski buskapurin er ógvuliga viðbrekin, og stutt er fra góðum arum til ring ár.

Hetta merkist eina mest í fiskivinnuni, sum er okkara høvuðsvinna.

Svikur tilfeingið eitt arið ella tvalan er um vanligar marknaðarprisir ella bæði tvey, rakar hetta fiskivinnuna sera hart.

Í slíkum árum gevur raksturin ofta stórt hall.

Men hóast fyritøkan frammanundan hevur havt fleiri góð ár og harvið goldið stórar upphæddir í skatti, er ikki møguligt, sum nu er, at mótrokna hallið í undanfarnum árum við vinningi.

Sum nu er, er bert heimild at framføra hall til frádratt í komandi góðum arum við vinningi.

Hetta vil Føroya Arbeiðsgevarafelag nu hava broytt, so møguleiki ikki bara verður at framflyta hall. Møguleiki skal eisini vera fyri at afturføra hall og harvið fáa ov nógv goldnan skatt afturgoldnan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur í arafrágreiðingini fyri 1997, sum just er útkomin, at eitt ringt ár kann merkja at reðari, sum hava gjørt løgur í nýggj skip, fara á hussgang, sjálvt um arini frammanundan hava verið góð. Viðari verður sagt, at illa ber til at gera upp nagreinilig avlop fyri einstøku arini, sum asett í skattalogni.

Sum oftast er eitt ár ov lítið til at kunna siga nakað um gongdina hjá einum virki. Heldur eiga metingar at verða gørdar yvir eitt longri tíðarskeið, møguliga nokur ár.

Við hesum sum grundarlagi metir Arbeiðsgevarafelagið, at møguleiki eigur at vera fyri at javna inntøkuna millum góð og vanalig ár. Hetta kundi millum annað verið gjørt við at nýta lóðligar avskrivingarreglur av virkisgognum og við virðissetanini av verugovmsluni at geva loyvi til at nýta lágar standardsatsir.

At afturføra hall fra ringum arum til farin góð ár er kent í øðrum londum og gevur ein javnari skatt til skattlandi inntøkur, sigur Arbeiðsgevarafelagið í sini fragreiðing.